sosialurin
Internet: http://www.cybernet.dk/faroe-news

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkustjóri: Kristjan Dahl
Lýsingar og sølа: Maria Bræðraberg

Blaðfólk: Randi Jacobsen, Áki Bertholdsen, Eirikur Lindenskov, Eyðun Klakkstein, Fróði Løksagarð, Magnus Dam

Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn

Telefon: 11820
Telefax: 14720

e-mail: sosialur@olivant.fo

Oljusamvinna við onnur lond

Oddagrein

HÓAST hon enn bert bomast úti í havsbrunni, so verða tað í hesum døgum lagdir lunnar undir ein útvikling, sum kann fáa alstóran týdning fyri samfelag okkara. Tað fer ikki dagur, at umboð fyri oljufeløg vitja. Hetta ber boð um okkurt. Spurningurin er so hvat! Vit vita, hvussu long tíð kann ganga, til nakað verður funnið, og tí er avgjørt rætt at vera tolin og realistiskur.

ANTIN olja finst undir Føroyum ella ikki, meta vit, at júst ÁHUGIN fyri undirgrundini kemur væl við í teimum annars so svartskygdu Føroyum. Tað er líkasum, at hesin áhugi og tað virksemi, hann setir í gongd, er við at geva fólki vónina og trúnna aftur á framtíðina. Høvuðsveikleikin við okkara samfelag er, at vit hava ein monobúskap. Nú hevur fiskivinnan bráddliga fingið ein „medspælara" í eini komandi fralandavinnu. Ein kann kanska siga, at vónirnar til og fyrireikingin av hesi nýggju vinnu taka líkasum ein part av tí ovurstóra trýstinum, sum er á fiskastovnarnar. Hetta skotbrá gevur uppá ein máta okkum stundir at fáa fiskivinnuna á føtur aftur og harvið at fáa lagt til rættis ein góðskingarbroyting, sum leggur arbeiði og virði eftir í hesum samfelagnum.

MILLUM mongu vitjandi eru umboð fyri hægri skúlar, ið útbúgva fólk til at arbeiða í oljuvinnuni. Tørvurin á oljuverkfrøðingum o.ø. verður stórur, nú ein møgulig vinna nærkast, og er eingin olja, so er lærdómur løttur at bera. Tá ber tað eisini til at fáa arbeiði í útlandinum og í øðrum vinnum her heima. At fiskivinnan tykist at fáa eitt andarúm er so eitt. Annað og ikki minni týdandi er, at útlitið fyri eini oljuvinnu skapar nýggjar útbúgvingarmøguleikar. Vit hava sum er bygt okkara samfelag á flest øllum økjum við teimum at núnu fólkunum, sum vit hava, eitt nú hava hundraðtals verkfrøðingar bygt út infrastruktur tvs. vegakerv, havnir o.l. Fiskivinnuútbúgvingar eiga at fáa hægri prioritet, tí vit hava brúk fyri hesum fólkum í eini meira nútímans og gevandi fiskivinnu. Men tá hesin tørvur er nøktaður, kann við rættum spyrjast hvussu við øllum øðrum?

HER kann ein fralandavinna, sum jú ber í sær nýggjar útbúgvingarmøguleikar fyri okkara ungdóm, koma ómetaliga væl við. Vitandi, at hesir møguleikar eru eina bestir í Noregi, ber tí at ímynda sær, at ein partur av føroyingum, sum í framtíðini fer av landinum at útbúgva seg, fer til Noregs. Slíkar útbúgvingar eru ikki í Danmark í sama mun og kostnaðarliga er tað í verandi støðu ov dýrt at lesa til Bretlands.

LÆRDUR háskúli í Noreg vil knýta samstarv við ymsar skúlar og stovnar, eitt nú Fróðskaparsetur Føroya, sum er komið meira í fokus, nú tosað verður um fralandavinnu. Tað er kanska eisini eitt sindur av lagnunnar speisemi, at oljuvirksemi, sum mong á Debesartrøð ynsktu burt av økinum, nú er við til at leggja lunnar undir virksemið hjá fleiri av útbúgvingar og helst eisini granskingarstovnunum á Debesartrøð. Hvat vit enn halda um hetta, so er tað áhugavert at bíta merki í, at tá vinna og mentan finna felags stev, sæst hvussu hesi kunnu ganga hvør øðrum og landinum.

TAÐ frøðir okkum, at Fróðskaparsetrið, sum mangir politikarar ynskja, har piparið grør, nú fær nýggjar og spennandi uppgávur, sum kunnu sannføra eisini tey kritisku, at vit hava brúk fyri hesum stovni, og at hann kann koma at fáa stóran týdning fyri samfelagsgongdina eisini.

SAMANUMTIKIÐ tykist nógv benda á ein útvikling, har tætt ari bond verða knýtt millum Føroyar og Noreg – bæði tá talan er um útbúgving av fólki og vinnuliga uppbygging av hesi vinnu. Høgtstandandi norskir politikarar og løgmaður hava eisini her í blaðnum umtalað eina slíka samvinnu sera positivt. Okkurt kundi bent á, at tað í næstu framtíð fer at henda okkurt á politiskum plani, har vit fara at sigga løgmann vitja Oljunoreg og norska oljumálaráðharran vitja í Føroyum. Í meðan hetta hendir er naggatoðn í viðurskiftunum millum Føroyar og Bretland. Áhugavert kundi verið at vitað, hvat tann so týðandi oljuídnaðurin í Bretlandi heldur um ta kós, sum er við at verða stungin út millum Føroyar og Noreg – um ídnaðurin ætlar at hyggja at, meðan bretska stjórnin við sínum viðgongdu og ómmuligu krøvum mótvegis føroyingum í markamálinum er við at avmarka og møguleikarnar fyri føroysk-bretskari samvinnu á oljuøkinum. Forresten, hvar finna vit Danmark í øllum hesum!

Sosialurin

Áheitan á allar javnaðarhugaðar føroyingar

Týsdagin fara vit aftur til valborðið, hesa ferð fyri at velja nýggj umboð í okkara bý- og bygdaráð.

Í nógvum kommunum verður ikki gjørd politisk uppstilling, og tað hava vit í javnaðarflokkinum sjálvandi stóra virðing fyri, tí aðalmálið at tæna heimbygdini á frægasta hátt er jú felags fyri øll valevnini uttan mun til politiskan lit.

Men annars er politisk uppstilling tann vanliga í teimum størru bygdunum og til øll býráðini. Hesum hevur javnaðarflokkurin sanniliga eisini størstu virðingina fyri, tí júst henda vegin hevur flokkurin møguleika at draga fram síni aðalsjónarmið í tí kommunala arbeiðinum.

Kommunuskuldin

Føroysku kommunurnar hava, sum landið alt, seinastu árini verið gjøgnum eina rættiliga trupla tíð. Tað er eingin loyna, at nógvar kommunur fíggjarliga eru sera illa fyri, orsakað av ov stórum lántøkum, tey fóru árini.

Samlaða kommunuskuldin er alt ov høg, men tað truplasta í øllum hesum er, at kommunurnar standa rættiliga einsamallar, tá tað snýr seg um at finna brúkiligar loysnir.

Landskassin hevur við bankabjargingunum sprænt 2,7 mia. kr. inn í føroyska bankakervið. Men orsøkin til hesar bjargingar var í flestu førum, at okkara bankar høvdu givið ov nógv ivasom lán til fyrst og fremst føroyskt vinnulív. Hetta gjørdist ein uppgáva fyri landskassan og harvið skattgjaldaran, men tá tað snýr seg um kommunuskuldina, so tykist tað ikki longur sum ein trupulleiki, sum tað almenna skal vera við til at loysa.

Ikki tí, at tað er ein umbering, men landsstýrið og kommunala eftirlitið hevur givið loyvi til hvørt einasta av hesum mongu lánum.

Tað er ikki, sum onkrir politikkarar vilja gera tað til, at her er bert talan um fíggjarligar loysnir ella kreditorloysnir, tí í øllum hesum trupulleikum búleikast vit føroyingar.

Longu nú siggja vit, at ymisku kommunuskattaprosentini elva til, at landsmenn okkara eru sera ymiskt fyri, fíggjarliga sæð. Júst hetta eigur at gera, at vit eisini siggja henda trupulleika sum ein landstrupulleika, sum løgtingið eigur at viðgera.

Nýggjur kommunubygnaður:

Harumframt stendur kommunuskipanin fyri stórum broytingum, sum kemur at krevja nógv av teimum, sum skulu stjórna kommununum komandi fýra árini.

Nógv hevur í seinastuni verið frammi um kommunusamanleggingar, men mangan er hetta orðaskiftið farið av sporinum, tí nógv hava ta fatan, at vit við eini samanlegging loysa allar kommunalar trupulleikar, eisini skuldarspurningin. Men ein kommunusamanlegging er ikki ein søk í sær sjálvum.

Vit hava í javnaðarflokkinum umrøtt henda spurning rættiliga nágreiniliga, tó at vit ikki eru komnir til nakra endaliga niðurstøðu. Men ein av okkara niðurstøðum er tó, at tað, sum treytar eina broyting av kommunubygnaðinum er, at vit á tann hátt kunnu veita borgarunum eina betri tænastu, og at trivnaðurin á økinum á flest øllum økjum batnar.

Men eitt munandi tættari samstarv á flestu økjum, sum vit longu í dag siggja nógvastaðni, er avgjørt eitt skilagott stig rætta vegin. Tá

Framhald á síðu 10

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða dóttur, genta, systir, svigarinna, ommu- og abbadóttur

TORGERÐ SUNADÓTTIR
Tórshavn

Andaðist hósdagin 28. nov., 30 ára gomul.
Jarðarferðin verður mánadagin 2. des., kl. 13.00 úr Havnar kirkju.

Fyri tey avvarðandi
Anna Maria, Suni, Olavur,
Arndis, Rani og Guðrun

NÝTT • NÝTT • NÝTT

BEITUHÚKAR í ymiskum støddum við rustfríum svørvum. Hava eisini 5 og 7 punds **LODD**. Tilboð verða givin.

Vinarliga ringið tlf. 75259